# Øðrvísi uppgáva

**Eftir upplivingina móti heimsstjørnunum í Lens, verður talan mikukvøldið um heilt øðrvísi uppgávu hjá føroyska fótbóltslandsliðnum**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*



*Tað ræður enn einaferð fyrst og fremst um hjá okkara monnum at standa rætt. Men Jógvan Martin Olsen staðfestir eisini, at nú mugu vit royna skora upp á møguleikarnar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Undan venjingini, sum landsliðið hevði á Tórsvølli týsdagin, fingu vit orðið á hjálparvenjaran, Jógvan Martin Olsen. Hann ivast ikki í, at talan framvegis er um trupla uppgávu, um enn hon er øðrvísi enn tann leygardagin. Men hann leggur dent á, at stórur partur av fyrireikingunum eisini snýr seg um vøllin.

- Standurin á vøllinum verður altavgerandi fyri okkara avrik. Undirlagið er øgiliga bleytt, og tí veit eg ikki rættiliga, hvussu hetta verður, tá vit hava vant nú í morgun, og tá Ísrael eisini skal venja í dag. Nú veit eg ikki, hvussu veðrið verður mikukvøldið, men verður talan so eisini um regn, so kann vøllurin væl gerast sera trupul at spæla á, heldur hann.

- Í aðrar mátar rokni eg við, at vit fáa ein truplan dyst, har tað serliga verða tveir faktorar, sum eru týdningarmiklir.

- Annar er, at vit halda fast um tað, sum vit hava verið góðir til. Altso at standa rætt á vøllinum í verjustøðu.

- Hitt er so, at vit skulu betra tað, sum vit ikki hava verið so góðir til. Nevnliga at skora, tá vit fáa møguleikan. Vit hava í næstan øllum dystunum í hesi undankappingini havt góðar møguleikar, men vit skora ikki, og so verða vit revsaðir.

*Men er tað nakað, sum tú fært vant?*

- Tá tú fært kjansin, so ræður um at vera eitt sindur kaldari og róligari, soleiðis at rætta avgerðin verður tikin.

### Effektivir ísraelsmenn

Føroyar hava eina ferð áður spælt móti Ísrael, og tá gjørdist talan um 1-1 javnleik.

Sammett við liðið ta ferðina, hevur Ísrael tó tikið seg nógv fram. Somikið nógv, at liðið er í eini rættiliga sterkari støðu, um tað eydnast at vinna teir báðar dystirnar móti Føroyum.

Jógvan Martin staðfestir eisini, at talan er um eitt sterkt mótstøðulið.

- Vit hava sæð tríggjar dystir hjá teimum, og eg vildi mett teir at vera á sama sum Sveis og Írland. Kanska ikki heilt á støði við Frakland, men at teir liggja soleiðis fyri, sum teir gera, sigur eisini nakað um styrkina hjá teimum.

- Og so havi eg lagt til merkis, at teir hava verið ótrúliga effektivir í avgerandi løtunum. Spælið hevur kanska ikki verið so polerað, men fáa teir møguleikan, so taka teir av, so teir skulu ikki hava nógvar møguleikar, áðrenn teir avgera dystin, sigur Jógvan Martin Olsen at enda.

# Tvey ivamál

**Størsti spurningurin tykist vera, hvørt tað skal gerast rúm fyri bæði Christian Høgna og Rógva Jacobsen, ella um einasta broytingin verður at finna avloysaran fyri Toda**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*




*Tað tykist sannlíkt, at Rógvi Jacobsen skal styrkja um føroyska luftspælið mikukvøldið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Skaðin hjá Toda Jónsson ger tað sjálvandi heilt víst, at broytingar mugu fremjast í føroysku uppstillingini, men í mun til dystin móti Fraklandi, verður talan neyvan um nakrar kollveltandi broytingar.

Allar helst verður tað soleiðis, at í 9 av 11 førum verður talan ikki um nakrar broytingar yvirhøvur. Einasta ivamálið afturat álopsplássinum tykist vera, hvørt Mortan úr Hørg enn einaferð fær møguleikan á høgra bakki, sum hann røkti so væl móti Kypros, ella um broyting eisini verður gjørd á hesum plássinum.

Verður talan um broyting her, merkir tað ivaleyst, at Christian Høgni Jacobsen verður settur aftur á bakkin. Hann hevur roynt hetta plássið á landsliðnum nakrar ferðir áður, og í Fraklandi kom hann eisini á hetta plássið stutt inn í seinna hálvleik.

Christian Høgni er tó eisini ein møguleiki, tá nýggi álopsmaðurin skal finnast fyri Toda Jónsson.

Her er ein annar møguleiki eisini, at Rógvi Jacobsen aftur fær pláss á liðnum. Kropssterki klaksvíkingurin hevur ikki minst sínar fyrimunir í luftspælinum, har hann sera sjáldan verður yvirmatchaður, og tí er tað avgjørt møguleiki fyri, at hann hesaferð fær leiklutin sum spælarin, ið skal binda miðvøll og álop saman, meðan Andrew so verður fluttur heilt fram á toppin. Tann leiklutin hevur Rógvi eisini spælt fyrr við góðum úrsliti, og tí er hetta als ikki óhugsandi.

Og triði møguleikin er so sjálvandi, at Mortan úr Hørg framvegis verður á høgra bakki, meðan álopið so verður mannað við Rógva og Christian Høgna, men sum Andrew hevur lagt fyri í donsku kappingini, so er kortini nógv, sum bendir á, at hann verður við frá fyrsta bríksli.

Tí verður okkara git um føroysku byrjunaruppstillingina hesa ferð soljóðandi: Jákup Mikkelsen - Christian Høgni Jacobsen, Óli Johannesen, Jón Rói Jacobsen, Súni Olsen - Jákup á Borg, Ingi Højsted, Fróði Benjaminsen, Claus Bech Jørgensen - Rógvi Jacobsen, Andrew av Fløtum.

# Ísrael krevur ein sigur



*Ísraelska landsliðið vandi á niðara vølli í Gundadali mánadagin. Týsdagin skuldu teir venja á Tórsvølli, har teir so eisini spæla dyst mikudagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Ísraelska landsliðið stendur við søguligum møguleika, nú teir skulu enda undankappingina við tveimum dystum móti Føroyum**

ÍSRAEL
*Jákup Mørk*

Bert eina ferð áður hevur Ísrael verið í nær námind einum endaspælið. Hetta var, tá teir á heysti 1999 spældu play-off dyst móti Danmark, men eftir at danir í fyrra dystinum vunnu ikki minni enn 5-0 í Tel-aviv, var spenningurin til ta royndina mest sum burtur.

Nú er talan tó um nýggja støðu. Enn hevur Ísrael ikki tapt í hesi undankappingini, og tí er vónin, at teir kunnu enda sína roynd við tveimum sigrum móti Føroyum. Og so er vónin, at Frakland ger sína skyldu við sigrum á Írlandi og Sveis, soleiðis at Ísrael kann taka næsta plássið, sum gevur rættin til play-off.

Tað eru tó ikki tær stóru stjørnurnar, sum eyðkenna ísraelska hópin í dag. Fyri fáum árum síðani vóru tað spælarar sum Eyal Berkovich og Haim Revivo, sum vóru lýsandi stjørnurnar í hópinum, men hesir eru ikki longur við.

Í dag eita stjørnurnar á liðnum Haim Tal Ban úr Bolton, Yossi Benyoun úr West Ham og Pini Balili úr Kayssary Spo, men eingin teirra hevur tó sama status, sum gomlu stjørnurnar.

Hinvegin er talan í dag um eitt munandi sterkari kollektiv, sum longu nú hevur tikið stór tak fram á altjóða leiðini. Um tað so fer at røkka til HM-atgongumerki á hesum sinni, er ein annar spurningur. Men royndin verður í øllum førum gjørd, og til tess krevjast tveir sigrar á Føroyum.

# 12. maður vil heiðra Henrik

Mikukvøldið skal Henrik Larsen fyri seinastu ferð standa á odda fyri føroyska fótbóltslandsliðnum í einum altjóða heimadysti.

Henrik stóð fyri fyrstu ferð á odda fyri føroyska liðnum, tá Liktenstein vitjaði á Tórsvølli tann 19. august í 2002. Ein dystur, sum Føroyar vunnu 3-1.

Og hóast talan ikki bara hevur verið um sigrar síðani tá, so er einki at ivast í, at føroysku áskoðararnir hava havt nógvar góðar løtur saman við Henrik. Ikki minst, tá hann í fyrsta undankappingardysti sínum var nær við at koppa Berti Vogts, tá Føroyar eitt skifti vóru á odda 2-0 móti Skotlandi, men eisini dystirnir móti eitt nú Týsklandi og heimadystirnir móti Frakog Írlandi.

Nevndin í 12. manni skuldi hava fund týsdagin seinnapartin, og tó at tey enn ikki høvdu gjørt av hvat skal henda, so tykist greitt, at ein gáva skal latast.

Enn hevði áskoðarafelagið ikki sett seg í samband við Fótbóltssambandið, men vónin er í øllum førum, at tað skal bera til at gera hetta undir dystinum mikukvøldið. Antin undan dystinum, ella í hálvleikssteðginum.

**-mørk**